## Tiger í ringum skørum

Síðani tað fyri góðari viku síðani varð skrivað, at Tiger Woods hevði fingið av at vita frá svensku konu síni, tá hon í øði um ótrúskap hevði bukað hann við eini golfkúllu, tykist listin við frillum ongan enda at taka. Sambært ensku og amerikonsku miðlunum er talið nú komið upp á seks elskarinnur, sum hvør í sínum lagi hava greitt frá puttunum, sum Woods eisini ger uttan fyri golfbreytina. Nú stendur somikið illa til, at ráðgevarnir hjá Woods vilja hava hann at traðka fram í talkshow hjá Oprah Winfrey, soleiðis at hann á tann hátt kann byrja av nýggjum.



## Adriano skeyt gullið heim

Brasilski Adriano varð eitt skifti mettur sum ein av heimsins bestu áleyparum, men rúsdrekkatrupulleikar og ein depression gjørdu sítt fyri at steðga málskjótingini. Nú er fótbóltsgleðin tó funnin aftur, og í gjár kundi hann taka ímóti meistarasteypinum í Brasil, eftir at teir í seinasta umfarinum vunnu 2-1 á Gremio og harvið hildu seg tvey stig framman fyri Internacional og Sao Paulo. Og luturin hjá Adriano lá ikki eftir. Við 19 málum var hann nevnliga besti málskjúttin hjá Flamengo í ár.



**Camilla Dalby og donsku landsliðsfelagarnir hava gjørt bart fyrstu umførini í HM-kappingini í kvinnuhondbólti, sum verður spælt í Kina í hesum døgum. Í gjár vunnu tær tryggan sigur á Fraklandi**

**Mynd: Polfoto**

# Danmark vann á Fraklandi

**Annan dagin á rað tók unga og lutvíst nýggja danska hondbóltslandsliðið hondbóltsheimin á bóli. Eftir sera spennandi dystin leygardagin, tá danir vunnu við einum máli móti Týskalandi rætt og slætt smurdu donsku hondbóltskvinnurnar íFrakland av**




Heri Simonsen

Úrslitið gjørdist 24-16 til Danmark eftir hálvleiksstøðuna 11-8. Stóri spælarin á danska liðnum var Camilla Dalby, sum skoraði nógv flest mál.

Eisini Kristina Kristiansen spældi ein góðan dyst. Men stórspælarin yvir øllum var málverjin Christina Pedersen, sum fullkomiliga tók franska liðið á bóli við at bjarga einum uppløgdum málmøguleika fyri og annan eftir.

Spælifordeilarin hjá danska liðnum eftir at lyklaspælarin Lærke Møller varð skadd var ikki við í dag. Louise Mortensen, sum spældi ein rimmar dyst í gjár, hevði skalað sær knæið, so hon var spard henda dystin men verður so við aftur næsta dyst.

Danmark spælir móti Kongo mánadagin kl. 11 okkara tíð. Dysturin verður sendur beinleiðis á TV2. Síðani skal Danmark spæla móti Brasilia og Svøríki.

Við fýra stigum hevur Danmark nærum tryggjað sær pláss í millumspælinum. Svøríki vann í gjár á Brasilia.

# Greiður sigur til Noreg

**Noreg hevur fult stigatal aftaná tveir dystir**




Heri Simonsen

Noreg vann ein tryggan 36-25 sigur ímóti Tunis í HM endaspælinum í hondbólti, sum er í Kina í hesum døgum.

Tað gekk tó ikki heilt eftir vild hjá norsku kvinnunum í fyrra hálvleiki. Undirtippaða tunesiska liðið fylgdi væl við, og Noreg var bert á odda 18-14 í steðginum.

Krøvini eru stór til norska liðið, og hondbóltsserfrøðingurin hjá norska TV2,

Ole Gustav Gjekstad var rættiliga atfinningarsamur um taktikkin hjá íslendska venjaranum, Tórir Hergeirsson. Gjekstad helt fyri at eygleiða norska liðið, var sum at síggja máling todna.

Til tað svaraði Tórir Hergeirsson bert, at hann var ikki vanur við at standa og eygleiða máling todna.

Noreg hevur óannsæð fýra stig, aftaná tryggar sigrar ímóti Japan og Tunis, og í morgin hevur Noreg aftur eitt mótstøðulið frá veikara endanum, nevnliga Chile.

Tórir Hergeirsson var nøgdur við sigurin ímóti Tunis, men var harmur um gongdina í fyrra hálvleiki: - Tað var eitt sindur strævið í dag. Vit komu ongantíð veruliga í gongd. Vit komu als ikki upp á sama støðið, sum í dystinum ímóti Japan. Men vit møttu einum betri og klókari liði í dag, segði Tórir Hergeirsson við norska blaðið VG, aftaná dystin.

Í bólki C hava Noreg, Ungarn og Rumenia øll fýra stig fyri tveir dystir, meðan Chile, Japan og Tunis øll hava einki stig, eisini fyri tveir dystir.

## Fylla 100 mikudagin

**9. desember eru júst 100 ár liðin, síðan Havnar Fimleikafelag varð stovnað. Síðsta tiltakið í sambandi við 100 ára hátíðarhaldið verður í Gundadali mikudagin**

**FØÐINGARDAGUR**
*Tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*

Allir limir felagsins við familju eru boðnir í føðingardag í Gundadali. Dagurin byrjar klokkan 17.00, og møtt verður á ovara vølli til felags upphittin. Síðani fara allir HF limirnir á niðara vøll at taka felagsmynd.

Øll fara síðani í skrúgongu niðan í Ítróttarhøllina, har Havnar Fimleikafelag bjóðar øllum vælkomnum til bollar og kakao, fimleikainnsløg og røður.

Ein bók verður eisini givin út á runda degnum. Høvið verður at síggja og ogna sær bókina hendan dagin fyri kr. 299,00 og eisini ber til at fáa bókina signeraða. Umframt bókina, verður eisini møguleiki at keypa onkra góða jólagávu, eitt nú HF-fløguna, HF-búnan og 100 ára hettutroyggjuna.

Við føðingardagskvøðu
Havnar Fimleikafelag, www.hf.fo